# Ein stór uppliving



*- Jú. Hatta var fantastiskt. Nakað heilt serligt, sum tú kanska ongan tíð sleppur at uppliva aftur, so tað mátti bara njótast helt Brandur um løtuna, sum hann var í fokus mikukvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í løtunum eftir, at hann hevði framført tjóðsangirnar báðar, tóktist Brandur Enni bara at njóta nú'ið. Stóð skimandi á vøllinum at síggja áskoðarafjøldina, sum fagnaði framførsluni, og sjálvur viðgekk hann eisini eftir dystin, at hetta hevði verið ein stór uppliving.

- Jú. Hatta var fantastiskt. Nakað heilt serligt, sum tú kanska ongan tíð sleppur at uppliva aftur, so tað mátti bara njótast helt Brandur, sum hóast sín unga aldur nú skjótt má teljast sum ein av teimum royndu føroysku sangarunum.

Og at royndirnar komu honum til góðar á Tórsvølli, man lítil ivi vera um. Í øllum førum segði hann eftir dystin, at hann sum so ikki hevði nakað serligt av nervum.

- Eg var sjálvandi spentur, men kortini ikki tyngdur av nervum. Tá tú stendur soleiðis undan dystinum og skalt syngja, so er tað jú áðrenn at nakað sum helst er avgjørt. Tað var bara at syngja av heilum hjarta, og so vóna tað besta. Bæði fyri meg og fyri liðið.

Og at tað gekk væl, skal eingin ivi vera um. Við stuðlinum frá bæði týska og føroyska 12. manninum á fullsetta leikvøllinum koyrdi Brandur á, og fagnaðurin eftir hetta mundi avdúka, at hetta fyri allar partar var ein serlig byrjan til eitt serligt fótbóltskvøld.

# Har stóð nógv á



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ikki bara á vøllinum sjálvum, at nógv stóð mikukvøldið. Fyri Tórsvøll var hetta eisini størsta einstaka tiltakið nakrantíð, og í vikuvís hava menn havt úr at gjørt við fyrireikingunum, soleiðis at alt skuldi klappa sum ætlað. Og sum heild má sigast, at fyrireikararnir stóðu royndina. Á myndini eru tað teir báðir, Poul Michelsen og Jógvan Páll Lassen, sum við hvør síni fartelefon geva seinastu ordrarnar, so eingin misskiljing skuldi vera.

**-jm**

# Trýstið var ov stórt

**Julian Johnsson viðgekk eftir dystin, at hóast føroyska vónin livdi leingi, so var týska trýstið og stórt**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað er einki at taka seg aftur í, at tað var ein svár løta hjá føroysku leikarunum eftir dystin móti týskarunum. Í samfullar 88 minuttir høvdu teir ímóti øllum forsøgnum hildið skansanum, og hóast eingin kann siga, at tað ikki var uppiborið, so mundi tað kennast tungt, tá Klose so úr stuttari fjarstøðu kundi stúta týska tokið avstað.

Ímyndin av føroyska stríðsviljanum hendan dagin mundi helst vera Julian Johnsson. Hann rennur vanliga nógv, men fáa ferðirnar munnu fetini hava verið so mong og nærdystirnir so harðir og nógvir í tali, sum teir vóru mikudagin.

Men sjálvt teir stinnastu stríðsmenninir mugu við hvørt geva skarvin yvir, og tað var meira ella minni tað, sum Julian mátti gera, tá dysturin var av.

- Vit liva allan dystin undir einum ótrúligum trýsti. Serliga í seinna hálvleiki. Teir seta jú bara meira og meira á, og spæla seg áhaldandi fram til møguleikar, so hatta mátti næstan koma fyrr ella seinni. Men keðligt var tað. Tað skal eingin ivast í, helt hann.

- Tá tað er sagt, so haldi eg eisini, at vit skulu vera nøgdir um avrikið. Hvør tann einasti leikarin framdi ein ótrúligan arbeiðsinnsats, og sjálvt um tað ikki var nokk, so gjørdu vit tað, sum stóð í okkara makt, og so gerst ikki meira, helt Julian, sum nú leggur leiðina til Íslands, har hann restina av kappingarárinum fer at royna seg við Á.

Og at tað verður ein missur hjá B36, man lítil ivi vera um. So kunnu útsagnirnar hjá leiðsluni í felagnum vera nóg so øvutar, men ein maður, sum í 90 minuttir taklar 11 týskarar mest sum um koll er ikki ein, sum tú uttan víðari finnur avloysarar til.



*Teir seta jú bara meira og meira á, og spæla seg áhaldandi fram til møguleikar, so hatta mátti næstan koma fyrr ella seinni, helt Julian Johnsson eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Noyddist sjúkur av vøllinum

**Jákup á Borg kendi seg ikki vera væl fyri, og bað tí um at verða útskiftur**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*

Tað mundi koma dátt við hjá føroysku áskoðarunum, at Jákup á Borg varð skiftur út tíðliga í seinna hálvleiki. Stutt undan hesum hevði hann tó verið eitt ørindi yvir móti føroyska beinkinum, og eftir dystin segði hann eisini, at hann hevði biðið um at verða útskiftur.

- Eg kendi meg ikki væl. Snøgt sagt. Longu fyri steðgin kendi eg tað, sum um øll megi var farin úr kroppinum, men eg valdi tó at nýta steðgin til at royna at koma fyri meg í. Tað var tó heilt skjótt, at beinini sýraðu til aftur, og so var einki at gera. Og havi tað framvegis ikki serliga gott í kroppinum, segði hann eftir dystin.

Eitt er, hvussu kroppurin hevði tað. Annað er, at sinnið - eins og hjá liðfeløgunum – ikki hevði tað serliga gott.

- Ja, hatta var ræðuligt. At missa so nær fyri aðru ferð á rað. Men tá tað er sagt, so skulu teir eiga, at teir vóru óhugnaliga torførir at spæla ímóti. Hóast teir høvdu nógv fólk frammi, so høvdu teir samstundis sera gott tak á verjupartinum, og hvørja ferð eitt lítið hol var hjá okkum at spæla í, so megnaðu teir at tippa tað.

- Vit eiga ikki at gloyma, at hatta altso var eitt av teimum heilt stóru liðunum, sum vit spældu ímóti, men nú byrjar tað altso at líkjast einum keðiligum óvana, sum vit mugu sleppa av við. Altso hetta við at missa í evstu løtu, helt Jákup á Borg at enda.



*Longu fyri steðgin kendi eg tað, sum um øll megi var farin úr kroppinum, segði Jákup á Borg, sum sjálvur bað um at verða skiftur út*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Vit spældu við hjartanum

**Henrik Larsen helt ikki, at hann kundi siga nakað um, at týskararnir vóru farnir við øllum stigunum**

FØROYAR–TÝSKLAND
*Jóannes Hansen*

Møguleikarnir hjá føroyska liðnum at fáa stig fara at fækkast. Enn er fyrsti sigurin í hesi undankappingini ikki vunnin. Leygardagin og aftur mikudagin vóru møguleikar fyri javnleiki, men vónirnar brustu báðu ferðirnar í evstu løtu.

– Tað er sera harmuligt, tá ið tað hevur eydnast at hildið tætt í 90 minuttir, at mótstøðumenninir so skulu fáa avgerandi málini í yvirtíðini. Men í kvøld kom tað ikki óvart á, at týskararnir fingu mál. Teir høvdu jú havt eina røð av møguleikum, áðrenn tað so eydnaðist.

Henrik Larsen líktist ikki einum tapara, tá ið hann møtti á tíðindafundinum.

– Eg ynski at rósa mínum spælarum. Teir framdu eitt framúr avrik. Teir spældu við hjartanum. Allir ofraðu seg, og tað kann ikki roknast við betri avriki ímóti Týsklandi, enn tað, sum vit vístu í kvøld, segði Henrik Larsen.





*– Eg ynski at rósa mínum spælarum. Teir framdu eitt framúr avrik. Teir spældu við hjartanum. Allir ofraðu seg, og tað kann ikki roknast við betri avriki ímóti Týsklandi, enn tað, sum vit vístu í kvøld, segði Henrik Larsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá ið Ivan Eginsson, sum stýrdi tíðindafundinum bjóðaði altjóða pressuni at seta føroyska venjaranum spurningar, var tøgn. Týska pressan var ikki áhugað í føroyska venjaranum. Teir bíðaðu eftir Völler, og so fekk føroyska pressan Henrik Larsen til síðis.

### Ikki sjey stig men…

Eitt tað fyrsta, sum Henrik Larsen segði, tá hann gjørdist føroysku landsliðsvenjari, var at siga, at vit helst skuldu hava sjey stig burtur úr hesum bólkinum. Fleiri vóru tá, sum rystu á høvdinum og spurdu, um maðurin var svakur, men hóast tað neyvan verður talan um hetta, so munnu tey rystandi í dag vera nakað væl færri í tali.

Sæð burtur frá 2-0 tapinum í Litava, so hevur støðan nevnliga í øllum hinum dystunum verið tann, at føroyingar eftir dystir hava iðrað seg um mist stig. Og tá hevur talan væl at merkja verið um lið sum Skotland á heimavølli, Íslandi í Reykjavík og týsku HM-finalistarnar bæði úti og heima. Vóru hesi úrslit nakað, sum Henrik Larsen hevði droymt um, tá hann gjørdist føroysku venjari.

- Ja. Tað verður nokk trupult at fáa hasi sjey stigini nú, men hyggur tú at dystunum, sum vit hava leikt, so hevur tað verið ófatiliga nær við. Vit hava í øllum førum einki sum helst at skamma okkum yvir, og hóast trýst frá mótstøðuni, so hava vit ongan tíð verið spældir niður og norð. Tvørtur ímóti hava vit fleiri ferðir sýnt gott fótbóltsspæl, og eg haldi avgjørt, at hetta er nakað, sum vit kunnu vera ernir um.

Men tú mást nokk eisini viðganga, at vit eitt nú í kvøld hava havt eitt sindur av hepni í okkara parti.

- Jú, sjálvandi. Men soleiðis er fótbóltur. Onkun tíð hevur tú hepnið við, og aðrar tíðir ikki. Í dag eru vit hepnir fleiri ferðir, men vit vóru beinleiðis óhepnir móti Skotlandi og partvíst eisini í Íslandi. Fyrr ella seinni ganga hesi bæði nokk upp, og so fara vit at fáa nøkur stig afturat, helt ein errin men vónbrotin venjari beint eftir at hann hevði verið somikið nær tí heilt stóru sensatiónini.

# Völler var lættur og ovurfegin

**Týski venjarin metti teirra avrik hava verið væl meiri sannførandi enn í Skotlandi, og hann segði seg alla tíðina hava roknað við, at málið fór at koma**

FØROYAR–TÝSKLAND
*Jóannes Hansen*

Tað varð bíðað eina góða løtu eftir honum á tíðindafundinum. Hugsanin stakk seg upp, um hann mundi fara at bera seg at, sum Javier Clemente gjørdi, tá ið Spania hevði vunnið 6–2 í Føroyum, og Oleg Romantsev gjørdi, tá ið Russland tvær ferðir hevði vunnið í Føroyum. Venjararnir hjá hesum báðum europeisku stórveldunum í fótbólti hirdu ikki at hitta pressuna á ætlaða tíðindafundinum.

Men soleiðis var tað ikki hjá karismatiska týska venjaranum og fyrrverandi álopsspælaranum. At tað gekk ein løta, áðrenn hann brosandi settist við borðið í forhøllini í stásiliga FSF húsinum komst av, at hann á vegnum, sum tað eisini var avrátt frammanundan, hevði verið í studionum, sum ARD sjónvarpsrásin hevði sett upp í horninum frammanfyri B36 húsið.

– Eg eri ovurfegin. Rudi Völler tóktist ikki kenna nakra trongd at fjala veruleikan.

– Føroyingarnir stríddust framúr væl. Vit megnaðu ikki at skjóta mál, hóast við høvdu sera góðar støður. Tá ið tað tekur seg soleiðis upp, fær lítla mótstøðuliðið eyka orku. Tað var akkurát sum í steypadystum heima í Týsklandi, tá ið eitt av stóru feløgunum í bundasliguni skal gera av við eitt lítið amatør felag. Fyri hvønn minutt, sum gongur, fær tann lítli eyka orku og yvirskot at stríðast, og so verður tað torførari og torførari. Men tað eydnaðist. Tað hevði eg roknað við, at tað fór at gera, og tað var gleðiligt, at tað bar okkum til at mynda væl fleiri upplagdar málmøguleikar, enn vit fingu í Skotlandi leygardagin. Men tað gekk illa at fáa úrtøku, staðfesti Rudi Völler.

Hann segði eisini eitt sindur um, hvat hann hevði hugsað, meðan hann undir dystinum sat og beit í yvirskeggið og viðhvørt var frammi við síðulinjuna fyri at geva sínum monnum ráð og íblástur.

– Sum gamal álopsspælari hevði eg bestan hugin at fara inn á vøllin at geva bóltinum síðsta skumpið inn um strikuna. Eg veit, hvussu tað kennist hjá álopsspælarum, tá ið tað gongur soleiðis, sum tað leingi gjørdi í kvøld.

### Mugu spæla betri

Völler ásannaði, at oddastøðan hjá Týsklandi í bólki fimm ber við sær, at tað tykist liggja væl fyri at sleppa upp í part í endaspælinum í Portugal næsta summar.

– Vit eru ovurfegnir um stigini, sum hava borið oddastøðuna við sær. Men vit eru ikki nøgdir við spælið. Tað mugu vit fáa betri skil á, tá ið tað eftir summarsteðgin aftur verður farið undir undankappingina. Nú fara spælararnir at hvíla seg. Tað hava teir rudduliga uppiborið. Síðsta summar brúktu teir stóran part av summarfrítíðini í HM endaspælinum. At teir nú fara at hvíla, rokni eg við fer at koma okkum til góða eftir summarsteðgin.

Völler vildi ikki siga, um hann metir Ísland ella Skotland vera besta boðið upp á næstfremsta plássið í bólkinum.

– Vit mugu hugsa um og arbeiða við at varðveita okkara støðu. Tað verður ivaleysa strevið hjá okkum. Bæði Ísland og Skotland hava møguleikan, var diplomatiska vendingin hjá gentlemanninum, áðrenn hann takkaði fyri seg.





*– Sum gamal álopsspælari hevði eg bestan hugin at fara inn á vøllin at geva bóltinum síðsta skumpið inn um strikuna, tók týski venjarin til á tíðindafundinum eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*